# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stjórnarlagsbroyting í Íslandi

Grannatjóðin fyri vestan hav, Ísland, fekk í gjárkvøldið nýggja og vinstravenda stjórn. Undir vanligum umstøðum hevði einki óvanligt verið við einum stjórnarskifti hjá grannum okkara, men hesaferð er øðrvísi. Talan er í hesum føri ikki bert um stjórnarskifti, men um veruliga stjórnarlagsbroyting, eitt systemskifti. Í út við hálva øld hevur Ísland verið undir konservativum stjórnarvaldi, har stýrt var eftir somu neoliberalistisku kós, sum varð hildin í USA undir George W. Bush, har frælsar marknaðarkreftir fingu ótálmaðar ræsir, har skattalættar og einskiljingar vóru gandaorð.

Nógv lond tóku eftir hesum politikki. Úrslitið varð tað sama víða hvar um heimin: partar av fólkinum gjørdust bráríkir, meðalstættin fekk meira pening um hendur, meðan láglønarbólkar og fólk uttan møguleikar fyri frívirðum gjørdust eftirbátar. Gullkálvsdansur rungaði um gamla vesturheim eins væl og um seinastu kommunistisku háborgirnar. Henda kollektiva veitsla var í stóran mun uttan støði í framleiðslu og tískil lánsfíggjað. Búskaparvøksturin gjørdist til bjølg, sum fyrr ella seinni mátti bresta. Tað gjørdi hann so. Gullkálvsdansurin bar meira enn so við her hjá okkum, men vit gjørdust tó tíbetur kortini ongantíð yvirtikin av hesi nýtslu- og spekulatiónsbylgju, ið sum ein brotasjógvur tók tað mesta av fíggjarliga yvirbygninginum í ríkum sum fátøkum londum omanav. Kanska høvdu vit hóast alt lært nakað av tí stórkreppu, sum rendi føroyska samfelagið um koll í nítiárunum.

Grannatjóðin Ísland var, yvirtikin av hesum fíggjarliga og búskaparliga ráki. Alt gekk við ørandi ferð, íslendskar fyritøkur gjørdust ríkari og ríkari, nýtslan rakk at hægstu altjóða tindum. Lánskarusellirnar mólu alt skjótari og skjótari, til hol kom á bjølgin – í USA fyrst fyri skjótt sum eitt annað beinkrím at breiða seg til at kalla allan heimin. Mestsum øll lond vórðu rakt, rík sum fátøk, stór og smá – øll, sum høvdu grundað sína nýtslu á lántøku ella sum vóru búskaparliga ella fíggjarliga heft at londum við hesum trupulleikum. Ísland var meinast rakt. Meira enn nakað annað land hevði Ísland við sínum neoliberalistiska búskapi og sínum altjóða grundaða fíggjarkervi verið uppií hesum ráki og tess dyggari gjørdist smeiturin, tá hol kom á bjølgin. Tað var tí ikki annað enn væntandi, at íslendski veljarin, sum í stóran mun stendur á berum, takkað verið tí neoliberalistiska og neokonservativa politikki, sum hevði verið rikin leingi, gav stóra stjórnarflokkinum durafjórðingin. Nú er so fyri fyrstu ferð í søgu Íslands komin til valdið vinstravend stjórn. Hon stendur fyri sera stórum og truplum uppgávum. Stjórnin skal so at siga normalisera íslendska gerandisdagin, fáa gongd á ein sunnan búskap og tryggja vælferðina hjá vanliga íslendinginum, sum í roynd og veru hevur framt stjórnarlagsbroytingina. Vit ynskja nýggju stjórnini hepna hond og vóna, at stjórnarlagskiftið verður íslendingum øllum at gagni.

**Sosialurin**

## Tunnlarnir norður um fjall á Borðoynni

**THEODOR ASKHAM OLSEN**
*Árnafjørður*

Nú nógv verður tosað um tunnlar norður um fjall á Borðoynni, vil eg hervið koma við eini áheitan á landsins myndugleikar um at seta seg niður og hugsa logiskt og nýta eitt lítið sindur av viti og skili, so at sleppast kann undan at koma afturum aftur og siga: »Hví gjørdu vit ikki tað rætta beinanvegin?«

Alt tos um at gera tunnil úr Ánunum og til Árnafjarðar er púra burtur úr vón og viti, og tað skal ikki so nógv vit til fyri at skilja tað.

Sjálvandi skal tunnilin ganga úr Gerðabø og til Árnafjarðar og síðan víðari har frá og til Norðtoftir.

Tað kann ikki vera meiningin, at vit norðan fyri fjall skulu yvir í Ánir, fyri síðani at koyra víðari, bert tí at ein góðshavn er har, og tí at tað eru nakrir handlar á eystara armi í Klaksvík. Tað eru eisini handlar á vestara armi!

Um góðshavnin í Ánunum og handlarnir á eystara armi í Klaksvík ikki klára seg uttan hjálp frá einum tunnli úr Ánunum, so klára tey seg kortini ikki.

Nei, sjálvandi koyra allir teir uml. 1300 bilarnir um døgnið (og teir verða fleiri tá ið tunnlarnir eru gjørdir) beinleiðis yvir í Gerðabø, fyri síðani at koyra víðari. Teir sum skulu til Klaksvíkar, koyra inn í Klaksvík, og hinir beinleiðis inn í Norðoyatunnilin.

Tað verður gjørt rættiliga nógv fyri at fáa ferðsluna út um bygt øki allastaðni runt um í landinum. Og her hava vit ein so góðan møguleika við at fara inn í Gerðabø, og harvið sleppa undan óneyðugari ferðslu ígjøgnum Klaksvík.

Hugsa vit um ferðslutrygdina, og ikki minst Co2 útlátið, og so eisini tað, at farleiðin hjá øllum føroyingum til miðstaðarøkið skal styttast mest gjørligt, so er avgjørt best at koyra eftir einum landsvegi uttan um bygt øki.

Hendan loysnin við tunnli úr Gerðabøð er eitt sindur dýrari, verður sagt. Men tað er bert partvíst rætt. Tí um tunnilin verður gjørdur úr Ánunum, so ganga nøkur ár, og so má Landsverk gera veg niðri undir Kjølinum, sum eg tó vil pástanda ikki letur seg gera. Tað vil siga at einasta loysn tá, er at gera tunnil undir Kjølinum norður í Ánirnar. Ikki er ringt vita, hvør loysn tá verur dýrari. Alt hetta stríð sleppa vit undan við at fara inn í Gerðabø, og vit fáa ta bestu og bíligastu loysnina beinanvegin. Øll minnast vit stríðið í Lorvík.

Mín áheitan á Føroya Løgting skal tí vera: Nýtið nú vit og skil, so at tit velja ta bestu og røttu loysnina beinanvegin, soleiðis at sleppast kann undan lappaloysnum, sum til seinast verða nógv dýrari.

## Avmarkað útsýni úr Vinnu- og javnstøðumálaráðnum

**KRISTIANNA WINTHER POULSEN**
*forkvinna í Javnstøðunevndini*



So hendi tað aftur. At tað var ógjørligt at finna eitt einasta konufólk við røttum førleikum til nevndararbeiði. Hesaferð til at umboða almennar partapengar í nevndini í einum partafelag, har tað almenna eigur tveir triðingar av partapeninginum.

**Avmarkað útsýni**
Við so lítlum vilja til at fremja javnstøðu, tykist lítil og eingin vón vera fyri at hugsa nakað petti øðrvísi, enn gjørt hevur verið í alt ov langa tíð. Hvussu skal vinnu- og javnstøðumálaráðharrin megna at búgva okkara samfelag út til framtíðina, tá ið hansara virksemi ber dám av so avmarkaðum útsýni og so vanabundnari hugsan?

Harmiligt er, at landsstýrismaðurin í vinnu- og javnstøðumálum ongan vilja vísir til at royna nýggjar leiðir á hesum øki. Harmiligari er, at hann sendir tey greiðu boðini til helvtina av íbúgvunum í Føroyum, at teirra førleikar ongan áhuga hava, tá ið fólk skulu finnast til nevndararbeiði. Og harmiligast er, at Føroyar hava ein landsstýrismann í vinnu- og javnstøðumálum, sum ikki hirðir at virða ta lóggávu, sum hann sjálvur umsitur.

**Málsøkið**
At gerast landsstýrismaður/-kvinna hevur við sær bæði spennandi og minni spennandi uppgávur. Treyðugt so, tí tað hevði verið ov nógv kravt, at ein og sami persónur skal brenna eins nógv fyri øllum málsøkjunum.

Og tað var neyvan tankin um málsøkið javnstøðu, sum var høvuðsorsøkin til, at Jóhan Dahl ynskti at átaka sær uppgávuna sum landsstýrismaður í vinnu- og javnstøðumálum. Men javnstøðumál hoyra nú einaferð heima í Vinnumálaráðnum. Og tí eiga landsstýrismaðurin og fyrisiting hansara at ganga á odda, tá ið talan er um at taka atlit til javnstøðulógina í øllum teirra virksemi.

**Serliga torført?**
Hetta nevndarvalið var serliga torført, skrivar landsstýrismaðurin í vinnu- og javnstøðumálum í skrivi, prentað í bløðunum 6. mai. Tí í hesum føri skuldu atlit takast til fleiri áhugamál og viðurskiftir. Og hendan nevndin skal sambært landsstýrismanninum vera *'før fyri at taka sær av sínum leiðsluuppgávum ... og samstundis vera ein konstruktivur og skikkaður sparringspartnari fyri stjórnina.'* Sambært landsstýrismanninum er tað eisini umráðandi, at nevndin altíð tekur avgerðir óheft av seráhugamálum. (!)

Hyggasíggj! So lærdu vit hetta um nevndararbeiði. Men vita vit meira um, hví ásetingarnar í javnstøðulógini ikki vórðu hildnar?

**Førleikarnir**
Í eini roynd at verja valið av nevndarlimum reksar Jóhan Dahl eisini upp eina røð av førleikum, hann serliga hevur lagt dent á í sambandi við hetta valið. Tað sigur seg sjálvt, at allir hesir førleikar ikki finnast hjá einum og sama persóni. Og tí er ein nevnd samansett av fleiri fólkum, sum saman kunnu geva leiðsluni og hvørjum øðrum neyðugt mótspæl og avbjóðingar.

At ikki eitt einasta konufólk finst við einum ella fleiri av teimum førleikunum, sum Jóhan Dahl sigur seg hava lagt dent á, kann ikki vera rætt. Og tí er setanin av nevndini hjá Atlantic Airways snøgt sagt ov illa úr hondum greidd.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.